# Reglugerð

# fyri

# Heilsufrøðiligu Starvsstovu

Við heimild í § 1, stk. 2 í Løgtingslóg nr. 23 frá 13.03.1986 um Heilsufrøðiligu Starvsstovu verður ásett:

## Endamál

**§ 1.** Endamálið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni er at gera lógarásett eftirlit og starvstovukanningar innan matvøru-, veteriner- og umhvørvisøkið og at granska og menna í tilknýti til hesar lógarásettu uppgávur.

*Stk. 2.* Heilsufrøðiliga Starvsstovan er føroysk tilvísingarkanningarstova (referensulaboratorium), tá talan er um øki, nevnd eru í stk. 1.

## Bygnaður

**§ 2.** Heilsufrøðiliga Starvsstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum.

*Stk. 2.* Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann røkja uppgávur fyri onnur ráð og almennar stovnar.

*Stk. 3.* Heilsufrøðiliga Starvsstovan er skipað við:

1) eftirlitsdeildum
2) kanningarstovum
3) gransking og menning.

*Stk. 4.* Á donskum verður Heilsufrøðiliga Starvsstovan nevnd Levnedsmiddel-, Miljø- og Veterinærstyrelsen. Á enskum verður Heilsufrøðiliga Starvsstrovan nevnd Food-, Veterinary- and Environmental agency.

## Eftirlitsuppgávur

**§ 3.** Fakligi førleiki stovnsins á matvøru-, veteriner- og umhvørvisøkinum skal støðugt vera á einum høgum fyrisitingarligum og fakligum støði, soleiðis at Heilsufrøðiliga Starvsstovan, við støðið í nýggjastu vitanini, kann ráðgeva Vinnumálaráðum og øðrum á § 1 nevndu økjum og breiða út vitan um viðkomandi fakøkir, ið Heilsufrøðiliga Starvsstovan varðar av.

## Kanningaruppgávur

**§ 4.** Fakligi førleikin á kanningarstovunum og greiningarnar skulu verða á høgum góðskustøði. Greiningarnar skulu vera altjóða- og handilsliga góðkendar. Kanningarstovurnar skulu, við støðið í nýggjastu vitanini á kanningarstovuøkinum, ráðgeva Vinnumálaráðum og øðrum á § 1 nevndu økjum.

## Granskingar- og menningaruppgávur

**§ 5.** Heilsufrøðiliga Starvsstovan fremur gransking og menning, sum er viðkomandi fyri menningina av teimum økjum, sum eru nevnd í § 1.

## Annað

**§ 6.** Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann átaka sær umbidnar uppgávur innan § 1 nevnda øki.

## Leiðsla

**§ 7.** Landstýrismaðurin setur og loysur úr starvið stjóran á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Stjórin hevur dagligu fíggjarligu- og fyrisitingarligu ábyrgdina av øllum virksemi stovnsins, og ábyrgdast mótvegis landstýrismanninum hesum viðvíkjandi.

*Stk. 2.* Stjórin setur og loysir úr starvi øll starvsfólk á stovninum sambært galdandi reglum.

*Stk. 3.* Stjórin hevur ábyrgd av, at virksemið á stovninum verður stjórnað samsvarandi galdandi lóggávu og reglum og annars í samsvari við innanhýsis reglur á stovninum.

*Stk. 4.* Har annað ikki er ásett í reglugerð ella við lóg, verður Heilsufrøðiliga Starvsstovan bundin við undirskrift stjórans.
*Stk. 5.* Stjórin kann geva starvsfólkum prokura, ið verður fráboðað Vinnumálaráðnum.

**Fráboðan**

**§ 8.** Heilsufrøðiliga Starvsstovan letur Vinnumálaráðnum, Veterinerdeildini eftirlits- og kanningarúrslit, sum hava týdning fyri eftirlit Landsdjóralæknans við sjúkustøðuni hjá dýrum og reinføris- og heilsustøðuni viðvíkjandi matvørum. Vinnumálaráðið, Veterinerdeildin, kann áseta reglur um hetta.

**§ 9.** Heilsufrøðiliga Starvsstovan gevur árliga hagfrøðisligar upplýsingar um arbeiðsuppgávur stovnsins. Vinnumálaráðið, Veterinerdeildin, kann áseta reglar um hetta.

**Gjald**

**§ 10.** Heilsufrøðiliga Stavsstovan tekur gjald fyri eftirlit, starvsstovukanningar og tænastur sambært galdandi kunngerðum ella sambært kontrakt við viðskiftafólk.

**Gildiskoma**

**§ 11.** Hetta rundskriv kemur í gildi beinan vegin.

Vinnumálaráðið, 21. mars 2003

Bjarni Djurholm (sign.)
Landstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)